# London



**Føroyska ferðalagið uttan fyri St. Paul's Cathedral**



*Bárður Nielsen, Arne Poulsen og John Rajani uttan fyri bretska parlamentið*



*Vilhelm Petersen, stjóri á Atlantic Petroleum, Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, Olaf Olsen og John Rajani, sendimaður í London*

Bárður Nielsen eftir Londonatak:

# Ein nýggj byrjan fyri Føroyar



*Bárður NIelsen, fíggjarmálaráðharri, uttan fyri virðisbrævamarknaðin í London*

**– Vit eiga at koma burtur úr dunnuhylinum í Føroyum og fara út í stóru verð at skapa okkum virðing og áhuga. Eitt nú er altjóða fíggingarmarknaðurin í London eitt slíkt plass og hövi sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, sum er púra ovfarin av ti stóra áhuganum fyri føroyska menningarátakinum í bretska høvuðsstaðnum mikudagin**

MENNINGARATAK

*Jan Müller, London*

Tað var ein sera vælupplagdur fíggjarmálaráðharri, sum beyð mongu gestunum vælkomnum til føroysku sendistovuna í London mikudagin. Og tað var ein ikki minni vælupplagdur Bárður Nielsen, sum tríggjar tímar seinni takkaði mongu gestunum fyri at hava lýtt á og brúkt hesa tíðina at fáa sær innlit í eina spennandi framtíð í Norðuratlantshavi, har hann beyð útlendingum at vera við til at skapa hesa framtíð og at røkka setninginum hjá landsstýrinum um, at Føroyar í ár 2015 skulu vera heimsins fremsta tjóð.

### Fantastiskur dagur

– Hetta hevur verið einki minni enn ein fantastiskur dagur. Eg eri ovfarin av, at so nógv framstandandi fólk fyri stórar fyritøkur hava sett tíð av til at vera her saman við okkum. Og tað er heldur ikki ein og hvør her er talan um. Hetta eru fólk, sum vissuliga hava fingurin á pulsinum, á borðinum og í fíggingarheiminum sum heild. Eg haldi, at hetta tiltakið er ótrúliga nógv vert fyri Føroyar. Bara tann umtala vit fáa kann fáa stóran týdning. Landsstýrismaðurin er milt sagt sera kløkkur av, at so mong oddafolk úr fíggingarheiminum og umboðandi finanspressuni umframt oljufólk vistu áhuga fyri tiltakinum.

– Hetta fer at skapa ekko einaferð í framtíðini, tað eri eg sannførdur um. Bárður Nielsen sigur við Sosialin, at tað er ikki nakað loyndarmál, at vit hava atlanir um at privatisera tær almennu fyritøkurnar. Tær eru eftirhondini vorðnar so stórur almennur klumpur, at tað er rætt at selja hesa kommerciellu stórfyritøkur, sum kappast á jøvnum føti við privatar fyritøkur. Hann sær einki skeivt í tí at kunna fíggjarverðina í London um hetta. Heldur tvørturímóti. Tað er bæði rætt og neyðugt. Og tað er í tøkum tíma.

### Burtur frá dunnuhylinum

– Vit eiga at koma út úr dunnuhylinum í Føroyum, sum bara er ein pinkulítil blettur á heimskortinum - og fara út í stóru verð at skapa okkum virðing og ans. Faa vit føroyingar at síggja møguleikarnar at vera við í ti stóru peningaverðini sum eitt nú henni í London, so dugi eg ikki at síggja nakra forðing í, at man luttekur á tí altjóða peningamarknaðinum eisini. Og eisíni øvugt: at vera her í London fyri at faá altjóða íleggjarar at vísa Føroyum ans.

Landsstýrismaðurin leggur áherðslu á bæði hesi tingini: at vit fáa skapt áhuga fyri hjá øðrum at vera við til at skapa nakað í Føroyum, men ikki minst tað, at vit føroyingar sjálvir fara út í tí stóru verð og skapa nakað og harvið ikki minst fáa vitan og kapital til Føroyar.

– Tað trúgvi eg er sera týdningarmikið fyri at ekspandera víðari og fyri at faa skapt ein vælferðarbúskap, sum vit jú øll vilja hava heima í Føroyum. (Sosialurin fer í komandi bloðum og í Vinnusíðunum í næstu viku at hava greinar frá hesum tiltakinum og øðrum í London, blaðm.)